

## Pepsi-stjórin hevur størst vald

Fortune Magasin hevur nú almannakunggjørt listan yvir tær kvinur í heiminum, sum hava størsta valdið. Ovast á hesum listanum er indverska Indra Nooyi, sum er spildurnýggj á top-50 listanum. Indra varð í august púra óvæntað vald sum stjóra í Pepsi, og stendur hon soleiðis á odda fyri eini fyritøku, við einum marknaðarvirði á 631 mia kr. Næstu kvinnurnar á listanum er Anne Mulcahy (Xerox) og Meg Witman (eBay). Listin ber dám av, at tað nú eru kvinnur í leiðandi vinnustørvum, sum toppa listan.

## Grøn alda hjá Statoil

Í vár byrjaði Statoil at selja sonevnt bio-benzin, sum er munandi minni dálkandi enn vanligt benzin. Og nú er norska oljufyritøkan so eisini klár við bio-diesel. Nýggja brennievnið sigst at minkað um koltvíiltuútlátið við 50%, men í fyrsta umfari fæst hetta tó ikki til keyps á marknaðinum. Ístaðin hevur felagið boðið eitt nú donskum fjølmiðlum at royna nýggja brennievnið.

# FaroeJet í støðugum vøkst

**Ferðafólkini økjast í tali, fraktflutningurin fyllir nógv, og nýggjasta føroyska flogfelagið er nógv eftirspurt á altjóða chartermarknaðinum. FaroeJet er komið inn í eina góða og positiva gongd, har vøkstur merkir virksemið**

FaroeJet hevur nú verið í luftini í fimm mánaðir. 15. mai fleyg nýggja føroyska felagið sín fyrsta túr, og nú vit skriva 3. oktober flýgur felagið framvegis og tað ætla teir eisini at gera framyvir.

Eisini eftir, at søgurnar herfyri vóru frammi um, at felagið ætlaði at tveita handklæði í ringin og gevast.

- Vit hava á ongan hátt ætlanir um at tveita handklæðið, men heldur eru vit farin mitt í ringin at stríðast, slær Jóhan E. Simonsen fast, tá vit hitta hann til eitt prát, um gongdina hjá felagnum, í lítlu skrivstovuhølunum á flogvøllinum.

- Vit kunnu bara lata væl at. Vit stríðast og strevast hvønn dag, sigur stjórin hjá lítlabeiggja í føroyskum loftrúmi.

### Framgongd á øllum økjum

Vit standa uppi og práta, men Jóhan biður okkum um at seta okkum kring borðið, og í meðan vit gera tað, spyrji eg hann, um hann ikki kann greiða nærri frá, hvat hann meinar við.

- Jú, vit hava fingið fleiri ferðandi, og faktiskt er tað soleiðis, at vit síggja framgongd á øllum økjum. Ferðafólkatalið økist so líðandi, fraktin er komin í eina góða og javna legu og vit flúgva alsamt fleiri chartertúrar, greiðir Jóhan E.Simonsen frá.

- Og tað merkir í stuttum, at inntøkurnar økjast, staðfestir Jóhan.

### Charter sum føroyskur vinnuvegur

Serliga hetta við chartertúrum er nakað FaroeJet hevur satsað nógv uppá. Hetta tí, at tað er ein stórur marknaður fyri chartarflúgving.

- Tað búgva 48.000 fólk í Føroyum, so marknaðurin her avmarkar seg sjálvan. Har aftur ímóti er marknaðurin óavmarkaður út í heimi, og har fáa vit eisini meiri og meiri at gera, sigur Jóhan Simonsen, og leggur samstundis dent á, at teir sjálvandi raðfesta Føroyaflúgvingina hægst.

Tað bankar á dyrnar og inn kemur ein dama við kaffi. Vit fáa okkum upp í koppin og Jóhan heldur á fram at greiða frá.

- Tað er ein øgiligur fyrispurningur eftir charterflúgving, og tað merkja vit ógvuliga væl. Onkran dagin hava vit fingið 20 fyrispurningar, og tá kunnu vit sjálvsagt ikki geva tilboð upp á allar túrararnar.

- Tað er eisini beinleiðis orsøkin til, at vit ikki flúgva millum Føroyar og Danmark leygardag. Tað er charterferðadagur burturav hjá okkum og øðrum, sigur Jóhan E. Simonsen.

Og tað gongur heldur ikki ein vika uttan chartertúrar. Onkra vikuna hava tað enntá verið fimm túrar á rað, og onkra aðra vikuna hava tað verið fýra túrar á rað.

Av chartertúrunum, FaroeJet hevur flogið, kunnu nevnast túrar til Prag, Brüxelles, Bordeaux og túrar fyri danskar og norskar fyritøkur, fyri ísraelska fótbóltslandsliðið og danska fótbóltsfelagið OB.

- Vit hava einans fingið góð feedback frá okkara chartertúrum, og vit merkja tað eisini aftur í, at sami meklari vendir aftur til okkum. Tað er tekin um, at fólk eru væl nøgd við okkara produkt og okkara tænastu, og tað eiga okkara starvsfólk burturav æruna av, sigur stjórin í FaroeJet.

Jóhan E. Simonsen heldur eisini, at vit í Føroyum eiga at síggja charterflúgving í eitt sindur størri høpi. Ja, sum ein møguligan stóran vinnuveg.

- Føroyingar eru jú verðinsmenn, tá tað kemur til sjóðferðslu og eg dugi ikki at síggja, at tað ikki eigur at kunnast førast yvir til flogferðslu. Føroyingar duga væl at takla óvæntaðar støður sum uppstanda her og nú, og tað eru eginleikar, sum eru nógv virðismettir í vinnuni.

- Og tá vit flúgva charter, so kappast vit við alt Evropa, sigur Jóhan E. Simonsen, sum vísir til Ísland sum flýgur nógv charter. Teir hava við 300.000 íbúgvum fleiri skrásett flogfør enn Svøríki, sum hevur níggju milliónir íbúgvar.

- Tá vit flúgva charter mugu vit eisini minnast til, at vit í veruleikanum tá útflyta arbeiðsorku. Tað svarar til at útflyta nógvan fisk, tí tað eru pengar, sum koma aftur til landið, sigur Jóhan E. Simonsen.

### Vantandi marknaðarførsla

FaroeJet hevur eitt flogfar. Eitt flogfar við breiðum og góðum setrum, faktiskt bestu flogsetur í danska kongaríkinum. Fjarstøðan millum setrini er eisini stór, so har er pláss fyri albogum og at strekkja beinini bæði væl og virðiliga.

Á FaroeJet fáa ferðafólkini eisini heitan mat, og eisini fáa tey tær drykkivørur, tey ynskja sær. Tað einasta, sum kostar, er spruttið.

Men tað eru tað ikki øll sum vita. Tað eru framvegis nógv, sum halda, at umborð á FaroeJet kostar alt pengar, eisini maturin og drekka. Samstundis eru tað ikki nógv onnur enn tey, ið hava flogið við teimum, sum vita, um góðu setrini og góða plássi.

Hetta gera vit stjóran vart við, og vit spyrja hann, um FaroeJet ikki hevur dugað illa at marknaðarført seg sjálvan? Jóhan E. Simonsen




*- Vit hava fingið fleiri ferðandi, og faktiskt er tað soleiðis, at vit síggja framgongd á øllum økjum, sigur Jóhan E. Simonsen*
*Mynd: Álvur Haraldsen*